# Føroyaflúgving ein verulig avbjóðing

**Longu sum 16 ára gomul fann Anette Larsen út av, at hon skuldi gerast flogskipari. Lagnan vildi, at hon nú í tíggju mánaðir hevur flogið upp á Føroyar, og tað var ein avbjóðing, sum hon ikki kundi siga nei til. – Á teimum flogvøllum, eg vanliga havi flogið til, hevur tú kanska brúk fyri einum parti av tínari útbúgving. Við at flúgva upp á Føroyar hevur tú brúk fyri øllum tí, tú hevur lært – í senn, sigur Anette Larsen**



*Tá eg fekk møguleikan at flúgv*
*móttøku, eg havi fingið her í A*

## Samrøða



**Leo Poulsen**
blaðmaður
leo@sosialurin.fo
myndir: Álvur Haraldsen

- Tá eg var 16 ára gomul tók pápi mín meg við út á ein flogvøll fyri svívflogfør og loyvdi mær ein túr. Tá bleiv eg bitin av at flúgva, og eg meldaði meg inn í felagið og tók prógv í svívflúgving. Og tú kanst siga, at eg tá gjørdi av, at eg skuldi gerast flogskipari, og at tað skuldi gerast mítt lívsstarv, sigur Anette Larsen.

Meðan hon tók prógv til svívflúgvara hitti hon fólk innan flúgvingina, sum brendu fyri fakinum, og sum eisini fingu hana beinda inn á tann vegin. Og ta tíðina útbúgvingin tók, gjørdist hon greið yvir, at hetta var tað, hon vildi gera.

Vit hitta hana vesturi á flogvøllinum í Vágum. Hon er júst lend við einum av flogførunum hjá Altantsflog, sum er komið úr Keypmannahavn, og dagin eftir skal hon á eitt trygdarskeið í neyðútgerð og neyðmannagongdum hjá flogfarinum . Flogskipararnir skulu alla tíðina halda seg dagførdar.

Beinanvegin, sum hon var liðug í studentaskúlanum, fór hon undir at lesa til flogskipara, og hon tók eisini teoriina rættiliga skjótt. Kortini skuldi ganga drúgv tíð, áðrenn hon fekk endaligt prógv sum flogskipari.

- Tað hendi nógv tá sum gjørdi, at eg ikki bleiv liðug við útbúgvingina. Eitt nú kom ein oljukreppa sum førdi við sær, at stígur kom í flogferðsluna sum



*Tað kann sjálvandi vera trupult at sameina starvið sum flogskipari við familjulívið, men í mínum føri er tað eingin trupulleiki, tí eg eigi eingi børn. Men eg kenni foreldur, har bæði eru úti og flúgva, samstundis sum tey hava smá børn, og har kann eg hugsa mær, at tað er ógvuliga trupult at fáa alt at sampakka, sigur Anette Larsen*

tað altíð ger, tá tað er órógv á oljumarknaðinum, og niðurgongd á heimsmarknaðinum í heila tikið. So eg legði útbúgvingina á hillina nøkur ár, áðrenn eg tók hana upp aftur í 1988, og gjørdist so liðug í 1990, sigur Anette Larsen, sum tá var 30 ára gomul.

### Dró út

Sum eina avleiðing av oljukreppuni fyrst í 80-unum steðgaði Anette Larsen á við flogskiparaútbúgvingini, og í staðin fór hon undir eina útbúgving sum flúgvileiðari.

- Ja, og tað komst mest av tí, at teir flogskiparir, sum eg kendi frá svívfelagnum, hildu eyka langa summarferiu og fóru í farloyvi uttan løn og gjørdu í heila tikið nógv fyri at býta tað arbeiði, sum nú einaferð var, ímillum sín. Vinnuvegurin var veruliga í einum aldudali tá, sigur Anette Larsen.

Sjálv fekk hon tey ráð frá vinum og starvsfeløgum at steðga á og síggja tíðina ann, og ikki brúka allan uppsparda peningin upp á eina útbúgving beint tá, tí tað hevði verið ein útbúgving til arbeiðsloysi.

Tað vóru kortini eisini aðrar orsøkir til, at Anette ikki tók prógv sum flogskipari júst tá.

- Eg hevði gaman í fingið ráð og vegleiðing, men eg kann ikki hava lurtað nóg væl eftir, tí tá tú hevur tikið teoriina, má tú taka prógvið innan 18 mánaðir, annars gongur teoriin út, og tað var so tað, sum hendi hjá mær, sigur Anette Larsen.

Hon tók sostatt teoriina, men hon gekk altso út áðrenn Anette fylti 21, og tað er aldursmarkið fyri, at tú kanst fáa eitt fullgildugt flogsertifikat.

Nú hevði hetta ikki tað heilt stóra at siga, tí við ringu útlitunum innan flogferðsluna valdi hon at søkja inn til flogleiðsluna í Keypmannahavn, har hon starvaðist fylgjandi átta árini, ein part av tíðini sum flogleiðara assistentur.

- Men hetta hevði ongan praktiskan týdning, tí tá eg helt fram við flogskiparaútbúgvingini mátti eg kortini taka teoriina umaftur, fyri at hon skuldi vera fult dagførd, sigur Anette Larsen.

### Atlantic inn í myndina

Hon fekk so sítt flúgvisertifikat í mars 1990, og um summarið fekk hon so starv í einum lítlum flogfelagi, sum fleyg frakt og post um náttina og ferðafólk um dagin.

- Nógvir ungir flogskiparar hava flogið við hesum felagnum og fingið royndir har, eisini nógvir av teimum, sum eg flúgvi saman vi í dag, sigur Anette Larsen.

Hon byrjaði sum free-lance flogskipari, men gjøgnum veturin fekk hon fast starv og fleyg fyri hetta lítla felagið í tvey og eitt hálvt ár.

- Aftan á hesa tíðina fekk eg so starv í tí, sum tá kallaðist SAS Commuter. Hetta vóru stuttir flogtúrar, og vit flugu eitt slag av flogførum, sum nevndust Fokker 50. Talan var um eitt systurfelag innan SAS á jøvnum føti við SAS Airlines, sigur Anette Larsen.

Har arbeiddi Anette so heilt fram til SAS Commuter bleiv lagt saman við SAS Airlines í 2005. Hon helt tó fram innan økið, sum fyrr hoyrdi undir SAS Commuter, tað vil siga stuttir túrar við flogførum, sum høvdu undir eitthundrað setur.

- Tað er tað, sum er mítt arbeiðsøki, sigur Anette Larsen.

Hon fleyg seinastu tíðina illa lýdda Dash-8 flogfarið, sum fyri tíð síðani var úti fyri nøkrum óhappum sum síðani førdu til, at øll flogførini av hesum slagnum hjá SAS – nøkur og tjúgu flogfør tilsamans – vórðu groundað.

- Tá so hesi flogfør vórðu sett frá einum degi til annan, gjørdist ein knappligur mangul upp á flogfør at flúgva tær rutur, sum Dash-8 flogførini høvdu flogið. Tá er tað, at SAS fer út at kanna hjá øðrum flogfeløgum, um tey kunnu hjálpa til í støðuni, sum er uppstaðin, og har var Atlantic Airways eitt av teimum flogfeløgunum, sum kundi lyfta ein part av uppgávuni, sigur Anette Larsen.

Hetta førdi so til, at Atlantic